# Summar Festivalurin hevur metstóra forsølu

**Summar Festivalurin í Klaksvík hevur longu selt yvir 3.000 vikuskiftispass í forsølu, og sølan hevur gingið so væl seinastu vikurnar, at fyrireikararnir nú kenna seg noyddar at seta eitt mark fyri søluna. Bara 1.800 atgongumerki verða seld afturat**



*Eftir øllum at døma verður útselt til Summarfestivalin í Klaksvík. Forsølan av vikuskiftispassum hevur longu rundað tey 3.000*

FESTIVALUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Áhugin fyri Summar Festivalinum í Klaksvík er øgiligur, og longu nú stendur rimmar fast, at tað verða nógv fólk á festivalinum, sum verður hildin í Klaksvík í døgunum 5. og 6. august.

Seinastu mánaðirnar hevur Summar Festivalurin selt vikuskiftispass í forsølu, og hendan forsølu hevur gingið so væl, at fyrireikararnar eru tiknir á bóli.

Heili 3.200 vikuskiftispass eru longu seld, og sølan gongur framvegis væl.

– Tað er komið óvart á okkum, at forsølan skuldi gerast so stór. Hetta er ivaleyst tann størsta forsølan til eitt tónleikatiltak í Føroyum nakrantíð, og nú mugu vit boða fólki frá, at tað verður avmarkað atgongd til festivalin, sigur Steintór Rasmussen, ein av fyriskiparunum, sum í hesum sambandi vísir á, at Summarfestivalurin eisini má taka fyrilit til trygdina á økinum, ferðamøguleikar og ikki minst at pláss skal verða fyri øllum festivalgestum, børnum og vaksnum.

### Helst útselt

– Tað er umráðandi fyri okkum, at vit tryggja øllum gestunum eitt gott upplivilsi, og tí mugu vit útfrá verandi karmum seta eitt mark fyri, hvussu nógv fólk sleppa á festivalin, sigur hann.

Summar Festivalurin hevur gjørt av, at tað verða bara seld 1.800 atgongumerki afturat til hvønn dagin á festivalinum í forsølu.

– Tað er gleðiligt, at so stórur áhugi hevur verið fyri festivalinum í ár, og sum ferðin á atgongumerkjasøluni hevur verið seinastu vikurnar, er stórur møguleiki fyri, at útselt verður til festivalin longu í hesum mánaðinum, sigur Steintór Rasmussen.

### Forsølan steðgar

Summar Festivalurin varð hildin fyrstu ferð í fjør, og hann eydnaðist serstakliga væl. Festivalurin varð í fýra dagar, men leygardagurin var tann stóri dagurin, tá ið næstan 4.000 fólk vóru savnað á Vágsbøi at hoyra framførslur frá nøvnum sum Ken Hensley, Boney M, Frændum, Hanus Johansen og Rag Rags.

Væl eydnaða tiltakið í fjør og tey stóru nøvnini, sum Summar Festivalurin hevur fingið at spæla í ár, hava havt við sær, at áhugin fyri festivalinum hevur verið sera stórur.

– Tað eru nógv viðurskifti at hugsa um í sambandi við ein festival, og tað er avgerandi fyri okkum, at tiltakið eydnast væl aftur í ár. Tí mugu vit seta eitt mark fyri, hvussu nógv fólk kunnu sleppa inn til festivalin, og vit leggja nú alla orku í at fyrireika allar hugsandi tænastur til tey mongu fólkini, sum koma á festivalin, sigur Steintór Rasmussen.

### Fólk fáa ein møguleika

Summar Festivalurin hevur gjørt av, at tað verða í mesta lagi seld 5000 atgongumerki til hvønn festivaldagin, og nú umleið 3.200 vikuskiftispass eru seld, eru bara 1.800 atgongumerki eftir til hvønn dagin.

– Vit vilja gjarna boða fólki frá í góðari tíð, at tað er eitt mark fyri, hvussu nógv atgongumerki verða seld í forsølu til festivalin, so at tey, sum veruliga ætla festivalin, men ikki hava keypt sær atgongumerki enn, hava møguleikan at ogna sær atgongumerki, sigur Steintór Rasmussen.

1. juni vóru atgongumerki til hvønn festivaldagin sær sett til sølu, men annars ber framvegis til at keypa vikuskiftispass, sum er galdandi báðar dagarnar.

Higartil hevur Summar Festivalurin avdúkað, at Brian McFadden, Anne Linnet, Shakin' Stevens, Straight Ahead, Lawetz, Týr og I AM fara at spæla á festivalinum í ár. Fleiri nøvn verða avdúkað í næstum.

FRIM Î RKER OG M Ï NTER S Ï GES!

Gratis vurdering i T·rshavn p¬ Hotel Fºroyar

Fredag den 10. juni kl. 15-19 samt sßndag 12. juni kl. 10-12

Til vore kommende auktioner sßges frimÞrker og gamle breve samt gamle postkort, fragtbreve og andet frimÞrkemateriale samt mßnter, medaljer, pengesedler og ßvrige gamle betalingsmidler.



Medbring Deres samlinger til en gratis og uforpligtende vurdering.

Der vil ligeledes vÞre mulighed for vurdering i Deres hjem efter forudg¬ende aftale. Kontakt evt. vor lokale reprÞsentant Thorolf Bjºrklund p¬ tlf. 313631 (trÞffes fra 4/6) for yderligere information eller vort kontor i Danmark.

THOMAS H Ï ILAND AUKTIONER A/S

Nordre Ringgade 115 Å DK-8200 Aarhus N

Tlf. +45 8612 9350 / +45 4032 4711 / +45 2127 2198

www.thauctions.com Å e-mail: tr@thauctions.com